# Almannastovan

## Stjóraskrivari

**Á Almannastovuni er starv sum skrivari hjá stjóranum leyst at seta sum skjótast.**

Almannastovan umsitur fyriskipanir til einstaklingar eftir almannalóggávuni, herundir fíggjarligan stuðul, ráð og leiðbeining í persónligum og forsorgarligum spurningum og aðrar vegleiðingar.

**Arbeiðið sum skrivari fyri stjóran umfatar, umframt skrivarauppgávur og vanligt skrivstovuhald, eisini hesar uppgávur:**

- telefon- og avtalustýring
- frásagnir frá leiðslu- og øðrum innan- og uttanhýsis fundum
- fyrireikingar og upplegg til fundir
- uppfylging av fundum
- ábyrgd av verkætlanum
- aðrar uppgávur innan fyrisitingina

**Vit sóknast eftir einum fólki, ið**

- hevur skrivstovuútbúgving, HH ella aðra viðkomandi útbúgving
- hevur góðan førleika í føroyskum bæði skrivliga og munnliga
- góðan kunnleika til EDV
- ávísan kunnleika til journalarbeiði
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er røkin og hevur sans fyri samskipan
- hevur hug at samskifta við nógv fólk

Vit kunnu bjóða eitt spennandi, áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði við sera fjølbroyttum uppgávum.

**Løn og setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru J. Joensen, almannastjóra, á tlf. 353510.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:
Almannastovan
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 1. mars 2003**
Vinarliga merkið brævbjálvan: „Stjóraskrivari"

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í AB-húsinum 24. februar 2003 kl. 20.

Skrá sambært lógum felagsins.

Aftaná verður aðalfundur hjá AB-stuðlum.

**AB og**
**AB-stuðlar**

# Pedagogur

## til Dagrøktarskipanina í Klaksvíkar Kommunu

Vegna ov fáar umsóknir, verður søkt av nýggjum eftir pedagogi til Dagrøktarskipanina í Klaksvíkar Kommunu. Skipanin er ein partur av Sosialu Deild hjá Klaksvíkar Kommunu og hevur skrivstovu á 2. hædd, har sum sosiala deild húsast. Í skipanini eru 120 børn.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
Við tilvísing til leiðaran av Dagrøktarskipanini, at

- Samskipa virksemið í spælistovuni
- Vitjar dagrøktarheimini regluliga
- Ráðgeving og vegleiðing av dagrøktarum og foreldrum

**Vit ynskja:**

- at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- ert virkin, røkin og hevur lætt við at samstarva
- at tú hevur hug og áræði at skapa umstøður har børnini gleðast, trívast og mennast.

**Setanarviðurskifti:**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, men onnur avtala kann gerast. Starvið er at seta so skjótt, sum tað ber til. Løn og setanarviðurskifti sambært avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita við at vena sær til Sigrun Vágstún dagrøktarleiðara ella Jórun Niclasen samskipara, tlf. 41 00 00.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu sendast til

**Klaksvíkar kommunu**
Postboks 2, 700 Klaksvík

í seinasta lagi 16. februar 2003.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3373, Sp/f Profa Gólv, 160 Argir.

**Viðtøkur broyttar:**
19.12.2002.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:**
Randi Jóna Winther Saxov, Reynsgøta 4, 160 Argir (formaður) og Eyðfinn Karbech Eyðunsson, Reynsgøta 4, 160 Argir.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum ella allari nevndini.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 283, P/F Alma Maskinverkstaður & Smiðja, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Gunnar Waagstein, Smærugøta 8, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:**
Óluva Josefina Waagstein, Ægishædd 3, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:**
Gunnar Waagstein, Smærugøta 8, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3167, Sp/f Auxilior Technology, 826 Trongisvágur.

**Viðtøkur broyttar:**
19.12.2002.
**Nýtt navn:** P/F Auxilior Technology
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 210.000,00 til kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 187.500,00 til kurs 320 og kr. 22.500,00 við skuldarumskifti til kurs 100.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:**
Aleksander N. Vilhelm, 900 Vágur (formaður), Tim Kristoffer Wentzlau, 826 Trongisvágur, Heinrich Peter Christian Schmidt, Jens Truelsensvej 33, DK-7000 Fredericia og Jan Ziskason, Torkilsgøta 22, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum saman við nevndarformanninum ella av allari nevndini saman.
**Endamál:**
Endamál felagsins er at menna, framleiða og marknaðarføra IT-skipanir og IT-útgerð innanlands og uttanlanda og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

**www.sosialurin.fo**




Brúðarlín hevur yvir 100 brúðarkjólar o.a. til tín at velja ímillum. Kostnaður at leiga: 3300 kr., íroknað mvg og møguligar broytingar.

Brúðarlín
tlf. 314281
www.brudarlin.com

# Coca-Cola-Cup 2003

ÍF bjóðar øllum dreingum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í Ítróttarhøllini á Kambsdali 22. - 23. februar

**Aldursbólkarnir eru hesir:**

| | |
|---|---|
| Pinkur | f. 93-94 |
| Gentur 10-12 | f. 91-92 |
| Smágentur 12-14 | f. 89-90 |
| Gentur 14-17 | f. 86-88 |
| Pinkulingar | f. 95-96 |
| Smápiltar | f. 93-94 |
| Piltar | f. 91-92 |
| Smádreingir | f. 89-90 |
| Dreingir | f. 87-88 |
| Unglingar | f. 84-86 |

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum Gentur 14-17, dreingir og unglingar eru bert 4 leikarar. Loyvt er at hava ein eykaleikara. Luttøkugjaldið er kr. 200 fyri hvørt liðið. Nr. 1 í hvørjum aldursbólki fær eina T-shirt. Seinasta freist at boða frá luttøku er mikudagin 19. februar.

Tilmelding:
á tlf. 445132 millum 18-22
á tlf. 260290 millum 15-19
fax. 444636

<ph_1>



# Leiðari til KAFETERIA

## í Norðurlandahúsinum

Starvið sum leiðari av Kafeteria í Norðurlandahúsinum í Føroyum verður hervið lýst leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:** Uppgávan er, at hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum, at ráðleggja og menna kafeteriavirksemið í Norðurlandahúsinum. Arbeiðið fatar eisini um ítøkiliga matgerð, kundaavgreiðslu og aðrar uppgávur, sum hoyra einum livandi matstaði í einum mentunarhúsi til.

**Førleikakrøv:** Viðkomandi útbúgving, ella arbeiðsroyndir úr líknandi starvi, har ábyrgd fyri leiðslu eisini hevur verið partur av virkseminum. Av týdningi er eisini persónligur alskur til matgerð, sum eftir umstøðunum kann gerast á staðnum. Ynskt verður eitt fólk, ið er fryntligt, nýhugsandi, røkið og sum ikki aftrar seg fyri nýggjum avbjóðingum.

**Lønar- og setanartreytir:** Starvið verður sett í 4 ár við møguleika fyri framhaldi, sambært reglum fyri stovnar undur Norðurlendska Ráðharraráðnum og lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Ynskiligt er, at leiðarin kann byrja skjótast gjørligt, ella í seinasta lagi 1. apríl 2003.

**Starvstíð:** Starvið er fulltíðarstarv, har arbeitt verður eitt vikuskifti um mánaðin.

**Umsókn:** umsóknir til starvið sum leiðari av Kafeteria í Norðurlandahúsinum skulu saman við møguligum prógvum og viðmælum sendast til: Norðurlandahúsið í Føroyum, Postboks 1260, 110 Tórshavn og verða Húsinum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2003. Merkið brævbjálvan: "Umsókn, Kafeteria".

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjóran í Norðurlandahúsinum, Helgu Hjörvar, telefon 317900, e-postur helgah@nlh.fo

**Norðurlandahúsið í Føroyum** er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum og Føroya Landsstýri. Uppgáva Norðurlandahúsins er at fáa norðurlendska mentan til Føroya og føroyska mentan til onnur Norðanlond, umframt at stuðla føroyskari mentan. 21 fólk, svarandi til 17,25 ársverk, starvast í Norðurlandahúsinum. Av hesum eru ein leiðari og trý fólk í hálva tíð í Kafeteria. Í 2002 vitjaðu tilsamans 92.210 fólk í Norðurlandahúsinum, 45.425 teirra í sambandi við lýst tiltøk. Í Kafeteria vóru í 2002 skrásettar 49.396 avgreiðslur móti 33.845 árið fyri.

# Umboðsmannaval

Veljast skulu 4 umboðslimir. 3 fyri Vág, 1 fyri Sumba.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera Sjúkrakassanum í hendi innan 4. mars 2003. Valið fer fram á skrivstovuni 20.3.03.

**Suðuroyar Sunnari Sjúkrakassi**

**TK Stovan**

**Einkarrættur við meira**

**Hvussu verjir tú eina nýggja vøru ella eitt nýtt hugskot við patent, vøru-merki, brúksmodell, design (íroknað Software).**

TK Stovan veitur ráð og vegleiðing til virkir og einstaklingar.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3506
**Navn:** Sp/f Accord
**Adressa:** 825 Froðba
**Kommuna:** Froðbiar Kommuna
**Stovningardato:** 05.02.2003
**Viðtøkudato:** 05.02.2003
**Kapitalur:** Kr. 150.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 150.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** John Park, 825 Froðba og Knútur Nygaard, 826 Trongisvágur.
**Nevnd:** Knútur Nygaard, 826 Trongisvágur (formaður) og John Park, 825 Froðba.
**Stjórn:** John Park, 825 Froðba.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum og formanninum í felag.
**Grannskoðari:** Sp/f ADS-grannskoðan, 826 Trongisvágur.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:**
05.02.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu og annað yrki í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

# DAEWOO TACUMA 2.0 CDX

*við metallakki*

**184.000,-**



**el-rútar, servostýring, 15" alufelgur, ABS bremsur, við EBD fjarstýrdum sentrallási o.m.a**
**3 árs garanti**

Hví keypa ein brúktan bil, tá tú kanst fáa ein nýggjan so bíliga

DAEWOO
*- ein skilagóð avgerð!*

**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# UNITED WORLD COLLEGE

Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið er liðugur í 1. studentaskúlaflokki á sumri 2003, at taka IB (IB merkir International Baccalaureate, og er hetta eitt altjóða studentsprógv, ið gevur somu rættindi sum eitt føroyskt studentsprógv), eftir 2 árum á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 70 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Stuðulsstovnurin rindar – eftir umsókn – skúlagjaldið, og næmingurin, ið fer á United World College, fær útbúgvingarstuðul frá Stuðulsstovninum eftir somu treytum, sum studentaskúlanæmingar í Føroyum.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Mentamálaráðið ella til lestrarvegleiðingina á studentaskúlunum.

Umsókn um upptøku á Red Cross Nordic United World College, ljóstak av støðumetan og stutt frágreiðing um teg sjálva/n skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. mars 2003. Gjørt verður vart við, at einki umsóknarblað finst.

**10. februar 2003**

**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55**